gult cyan magenta svart

Norður- og hátýska málið í Skandinavia í Hansatíðini og í 16. øld

Almennur fyrilestur verður á Fiskirannsóknarstovuni hóskvøldið 14. september 2000 kl. 20.

Kurt Braunmüller, dr. phil.habil., professari, heldur fyrilestur, ið hann kallar: »Luturin hjá tí norður- og hátýska málinum í Skandinavia í Hansatíðini og í 16. øld«

Kurt Braunmüller er professari í málfrøði, dr.phil. habil. við Universitetið í Hamburg. Hann hevur m.a. skrivað um føroyskt í bókini “De nordiske språk”, sum kom út í 1998. Hann var ein av fyrireikarunum og fyrilestrahaldarunum á ráðstevnuni um málvísindalig ástøði og føroyskt, sum var í Føroyum í juni í ár.

Fyrilesturin verður í tveimum, hvør parturin umleið hálvan tíma við steðgi uppá 15 min. ímillum.

Fyrri parturin verður um tær mentunarligu og málsligu fyritreytirnar fyri sambandi millum Norðurtýskaland og Skandinavia (Danmark og Svøríki). Dentur verður serliga lagdur á tað serliga málsliga sambandið, ið ger tað møguligt at skilja hvønn annan, tá málini eru nær í ætt.

Seinni parturin verður um treytir og fyritreytir fyri víðari málsligum sambandi við týskt aftaná trúbótina, tá bíbliutýðingarnar hjá Luther fáa ein avgerandi lut fyri menningina av nýggjum tekst- og stílnormum bæði í donskum og í svenskum.

Herfyri kom ein bók, sum er ein góð innleiðsla í evnið. Tað er Vibeke Winge: Pebersvend og poltergejst. Tysk indflydelse på dansk. Gyldendal, København 2000.

Legur fyri rørslu- og menningartarnað

Tær sera væl dámdu legurnar fyri rørslu- og menningartarnaðum og teirra næstingum, »Okkara legur«, vera í Nesvík frá 15. til 17. og frá 22. til 24. september

Tað er sjeynda árið á rað, at Heimamissiónin skipar fyri legum fyri rørslu- og menningartarnaðum og øðrum. Luttakararnir á legunum hava dámt sera væl og gleða seg hvørja ferð at sleppa aftur á legu.

Á legunum í ár fara foreldur at børnum við serligum tørvi at halda fyrilestrar. Fyrireikararnir siga, at ofta verða trupulleikarnir hjá rørslu- og menningartarnaðum tiknir fram. Hesa ferð ætla tey tó at leggja dent á gleðina, eitt rørslu- ella menningartarnað barn ella vaksið fólk kann geva familjuni, og koma foreldur at siga frá hesum. Hetta sæst eisini aftur í evninum fyri leguna, sum er „gáva - uppgáva - gleði“.

Eins og undanfarin ár verður nógv ymiskt virksemi á legunum. Millum annað hestaríðing, spøl, ítriv og sangur. Sjálvandi verður eisini nógv gjørt burturúr hugnakvøldinum leygarkvøldið.

Undirtøkan til legurnar plagar at vera sera góð, og tað vænta fyrireikararnir eisini, at hon verður í ár. Fleiri stovnar plaga at vera við, men fyrireikararnir sakna kortini, at fleiri av næstingum teirra eisini komu.

Enn er pláss á legunum, men tað ræður um at skunda sær at boða frá luttøku, tí freistin er úti í hesi vikuni.

Sandoyarferjan aftur trupulleikar

Ferjulegurnar til Sandoyarferjuna eru nú li›ugt umbygdar. Men tær passa ikki til ferjuna, og tí má hon nú byggjast um



Arbei›i› at laga ferjuskráarnar til Sandoyarferjuna er li›ugt. Men eftir 10 milliónir er greitt, at skráarnir ikki kunnu brúkast

Mynd: Jens K. Vang

John Johannessen

Nú arbei›i› at tillaga ferjulegurnar á Gomlurætt, í Skopun og í Hesti til n‡ggju Sandoyarferjuna er um at vera li›ugt, er greitt, at n‡ggja Sandoyarferjan ikki kann leggja at teimum.

Skip og ferjuskráar hóska rætt og slætt ikki saman.

Orsøkin er, at Landsverkfrø›ingurin, sum hev›i ábyrgdina av at tillaga ferjuskráarnar, ikki hevur lagt til merkis, at Sandoyarferjan er eitt sindur ør›vísi enn verandi ferjur í Føroyum.

Agnhaldi› ov stórt

Ta› sokalla›a agnhaldi› á Sandoyarferjuni er størri enn agnhaldini á hinum ferjunum í landinum.

Agnhaldi› er ein bjálki undir portrinum har afturi á ferjuni, sum skal krøkja skipi› fast at ferjuleguni.

Men Landsverkfrø›ingurin hevur nú gjørt ferjulegurnar solei›is, at ein bjálki, sum skal stíva ferjuskráan av, er settur júst á ta› sta›i› á ferjuskráanum, har agnhaldi› og ferjuskráin skulu koma saman.

Tí glí›ir ferjan bert frá aftur ferjuskráanum, um hon roynir at krøkja seg fasta í hann.

Broyta skipi›

Tá fari› var› undir at projektera n‡ggju Sandoyarferjuna var› avtala›, at ferjan skuldi gerast sum ynskiligt var, og sí›ani skuldu ferjuskráarnir tillagast, um hetta var› ney›ugt.

Hetta bleiv sí›ani ney›ugt, men tá hetta arbei›i› so at siga er miseydna›, samrá›ast Landsverkfrø›ingurin og Strandfaraskip Landsins nú um, hvørt ta› skal vera ferjan ella skráarnir, i› nú skulu umbyggjast.

Magnus Magnussen, tekniskur lei›ari hjá Strandfaraskipum Landsins, sigur, at Strandfaraskip Landsins hava havt fund vi› skipasmi›juna um at broyta skipi›. Og í løtuni ver›ur kanna›, hvat hetta fer at kosta.

Men Starndfaraskip Landsins ætla sær ikki at gjalda kostna›in.

– Ta› er myndugleikin, sum hev›i ábyrgdina av at gera umstø›urnar á landi, sum hevur bori› seg skreivt at, og tí fara vit eisini at krevja, at ta› ver›ur hesin myndugleikin, sum rindar kostna›in av at broyta ferjuna, sigur Magnus Magnussen.

Ta› harmar tekniska lei›aran, at ta› møguliga skal ver›a ney›ugt at broyta eina spildurn‡ggja ferju, á›renn hon hevur siglt fyrsta túrin.

– Hetta er óney›ugt strí›, hóast talan ikki er um nakra stóra umbygging, i› fer at gera ferjuna seinni li›uga enn ætla›, sigur Magnus Magnussen.

Landsverkfrø›ingurin rindar einki

Signar Heinesen, sum hjá Landsverkfrø›inginum hevur ábyrgdina av arbei›inum at gera ferjuskráarnar, sigur, at talan ikki er um nakra stóra villu.

– Ta›, sum er hent, er, at ta› er gloppi› naka› burturímillum hjá bá›um pørtum í arbei›inum. Og ta› er ikki óvanligt, tá talan er um slík stór arbei›i, sum ver›a gjørd í skundi, sigur Signar Heinesen.

Harafturat ger Signar Heinesen greitt, at hann ikki kann ímynda sær, at Landsverkfrø›ingurin fer at rinda kostna›in av at broyta ferjuna, um ta› ver›ur hon, i› ver›ur broytt.

Kortini vænta hvørki Strandfaraskip Landsins ella Landsverkfrø›ingurin, at ta› fer at kosta nógv at broyta ferjuna, ella um ta› møguliga ver›a ferjuskráarnir, i› skulu broytast.

Men ta› er tó greitt, at ta› kosta›i 10 milliónir at tillaga ferjulegurnar solei›is, at tær kortini ikki kundu brúkast.

Strí›ast um fíggjarkarmar

Landsst‡rismenn eru ónøgdir vi› karmarnar, teir hava fingi› á fíggjarlógini fyri næsta ár. Bent eftir middag í gjár var samgongufundur um endaligu karmarnar

John Johannessen

Allir landsst‡rismenninir eru ikki nøgdir vi› teir karmar, teirra málsøki hava fingi› tilluta› frá landsst‡rismannium í fíggjarmálum á fíggjarlógini fyri 2001.

Eftir middag í gjár hittust samgongulimirnir í Tinganesi at semjast um endaligu karmarnar á fíggjarlógini

Landsst‡risma›urin í Almanna- og Heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, er ein av landsst‡rismonnunum, i› heldur seg hava fingi› ov líti›.

Helena Dam á Neystabø vísti, tá fari› var› undir fíggjarlógararbei›i›, á eina játtan, hon metir vera ney›uga fyri Almanna- og Heilsumál komandi ári›.

Karmurin, hetta málsøki› hevur fingi› tilluta›an, liggur tó væl ni›anfyri hesa upphædd. Men Helena Dam á Neystabø vil ikki nevna nøkur tøl.

Í fíggjarlógini fyri í ár var játtanin til Almanna- og Heilsumál knøpp hálvonnur milliard. Tilluta›i karmurin í ár er hægri. Men er hetta orsaka› av prístalshækkan og ø›rum, vísir landsst‡risma›urin á.

Beint eftir middag í gjár, tá Sosialurin fór til prentingar, var samgonufundur í Tinganesi, har karmarnir endaliga skuldu avgerast.